# Evropa broytist – ídnaðarkollveltingin

3

*… hvussu stórar samfelagsligar kollveltingar hava broytt lívsumstøðurnar hjá fólki.*

## Mál

Tá hesin kapittul er gjøgnumgingin skulu næmingarnir vita, hvørjar fortreytir skulu uppfyllast fyri at ein *ídnaðargerðin* skal kunna vera gjøgnumførd, harumframt skulu teir kenna til ringu arbeiðskorini í 1800-talinum og eisini kenna til samfelagsligu broytingarnar, ið stóðust av ídnaðarliga umskiftinum. Tey skulu eisini vita, hvussu *politisku hugsjónirnar* vuksu fram í 1800-talinum.

Týdningurin av *ídnaðarkollveltingini* verður mangan samanborin við *landbúnaðarkollveltingina*, sum tók seg upp eini 10.000 ár frammanundan, tá ið menniskjuni fóru frá *eldru* til *yngru steinøld* og gjørdust búføst – um enn tað er rættari at kalla hetta eina stigvísa tillaging heldur enn eina kollvelting. Í hesum kapitlinum verða bæði ídnaðarkollveltingin og tær hugsjónir, sum vunnu fram um hetta mundið viðgjørd.

Tá ið vit tosa um hugsjónirnar *liberalisma*, *konservatisma* og *sosialisma* verða hesar hugsjónarligu lærur lutvíst knýttar at *upplýsingartíðini* og *fronsku kollveltingini* og at nýggja stættabýtinum í ídnaðarsamfelagnum.

Endin á kapitlinum lýsir sterku *framburðstrúnna* og *optimismuna*, ið settu sín dám á ídnaðargjørda vesturheimin seinast í 1800-talinum.

## Uppgávur

Uppgávurnar snúgva seg um kollveltandi broytingarnar í samfelagnum, sum fóru fram í 1800-talinum; til viðgerðar vera umframt flytingin frá húsligum arbeiði til verksmiðjuframleiðslu og stóri fólkavøksturin eisini tað mikla árin politisku hugsjónirnar høvdu á, hvussu fólk vera viðfarin. Framtíðartrúgvin síðst í øldini verður sett upp ímóti oyðingini av landslagnum og fátækadøminum, sum stóðst av skjótu umskiftinum í samfelagnum.

Lagt er upp fyri samstarvi við evni í støddfrøði og/ella í føroyskum.

Dickens, Charles: *Oliver Twist*


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Húsligt arbeiði gerst verksmiðjuarbeiði

**1700** Ein kvinna spann nóg nógv tógv til ein vevara at virka. Men framleiðarin vildi hava fleiri klæði gjørd.



**1733** „Flúgvandi skjúttilin" varð uppfunnin. Tá kravdust fleiri spinnarar at veita einum vevara tógv at virka.



**1764** Tá ið „Spinning Jenny" varð skapt, kundi aftur ein spinnari framleiða nóg mikið av tógvi til virksemið hjá einum vevara.



**1769** Richard Arkwright setti vatnhjól at mala spinnitólini. Tógvvirkingin varð í alt størri mun flutt úr heimunum á verksmiðjurnar.



**1785** Edmund Cartwright skapti ein vevstól, ið varð rikin við guvumaskinu. Nú varð nærum øll klædnaframleiðsla flutt á verksmiðjurnar.



*Mynd: Cecilia Björnekull*

1. Hvussu heldur tú, at skiftið frá heimavirking til verksmiðju arbeiði ávirkaði lívið hjá fólki?

2. Hvørjar fyrimunir og vansar sært tú við, at arbeiðið broyttist?

3. Slá upp í alfrøðini ella leita á netinum fyri at fáa greiðu á, hvussu klædnaídnaðurin mentist eftir 1785. Bygg víðari upp á tíðarásin omanfyri.

4. Nú skalt tú sleppa at royna seg sum søgufrøðing. Brúka alfrøðina ella netið og greina søguligu gongdina í tilvirkingini av onkrari aðrari vøru. Har er ovmikið av vørum at velja millum!



© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Broytingar í fólkatalinum

**Í talvuni sæst gongdin í fólkatalinum í nøkrum av londunum í Evropa frá 1800 til 1870 (tølini eru í milliónum)**

| | 1800 | 1850 | 1870 |
|---|---|---|---|
| Ongland og Wales | 9,3 | 18,0 | 22,8 |
| Skotland | 1,7 | 2,9 | 3,4 |
| Írland | 5,2 | 6,6 | 5,4 |
| Proysland | 10,4* | 17,2* | 20,3 |
| Restin av Týsklandi | 13,1* | 17,4* | 20,8 |
| Eysturríki | 23,2 | 31,3 | 37,5 |
| Frakland | 27,4 | 35,8 | 36,1 |
| Italia | 18,1 | 23,0 | 26,7 |
| Danmark, Svøríki, Noreg | 4,2 | 6,4 | 7,8 |
| | *ár 1816 | *ár 1855 | |

1. Fólkavøksturin var stórur í Evropa í 1800-talinum, men tó var hann ymiskur í ymsu londunum. Hvørji fýra lond høvdu størst fólkavøkstur, um tølini frá 1800 verða borin saman við tey frá 1870? Eftirsum londini frá byrjan vóru ymisk til støddar í fólkatali, ber illa til at samanbera økingina í avgjørdum (absoluttum) tølum, og tí verður hetta gjørt við lutfalsligum (relativum) tølum. Rokna út prosentvísu økingina. Set fólkavøksturin hjá teimum fýra londunum inn í eitt diagram!

2. Hvørji eru tey bæði londini, sum hava minsta samanberiliga fólkavøksturin?

3. Hvørjar orsøkir liggja til grund fyri afturgongd ella framgongd í fólkatalinum í einum landi?

4. Fólkavøksturin í einum av londunum brýtur greitt frá mynstrinum, ið sæst fyri hini londini. Hvat land er tað? Hvør er munurin í tølunum? Finn fram upplýsingar um søguna hjá landinum í 1800-talinum. Hvørja frágreiðing finnur tú fram til, ið lýsir, hví hesin munurin er á hesum landinum og hinum?


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Hugsjónirnar

Tá roynt verður við høgum innflutningstolli ella órímiligum innflutningsbanni at byrgja upp fyri innflutningi úr øðrum longum av vørum, sum kunnu framleiðast í landinum, førir tað til, at tey vinnurekandi innanlands meir ella minni verða tryggjað eitt fullkomið monopol á heimamarknaðinum í landinum.
(…)
Tað er sjálvsagt, at hin einstaki, hvør í sínum lagi, betri enn nakar statsmaður ella lógarsmiður kann gera í hansara stað, sjálvur er førur fyri at meta um, hvørjar av innlendis vinnunum hansara kapitalur skal brúkast til, og frá hvørjum væntast kann, at avkastið fær størst virði.

Adam Smith,
*The Wealth of Nations*
1776

Tað eru tey tvørrandi evnini at stríðast móti trupulleikunum, ið hevur ført til at sjálvsútnevnda franska stjórnin fer undir nýskipanar ætlanir sínar so fyrilitarleyst og fullkomiliga oyðandi. Men er tað í oyðing og soran at skilvísi vísir seg?
(…)
At varðveita og umskapa í senn er nakað heilt annað. Tá ið brúkiligu lutirnir úr gomlu skipanini verða varðveittir, og tá ið tað, sum lagt verður aftrat skal fáast at passa saman við tí, sum er, krevur tað eitt vakið sinni; støðugt uppmerksemi; umframt evnini at javnføra og samanbera ágóðarnar av brúkiligum kunnleika.

Edmund Burke,
*Reflections on the Revolution in France*
1790

Søgan um øll samfeløg higar til dags er søgan um stættastríð.
Frælsur og trælur, aðal og almúga, barónur og leigulendingur, meistari og sveinur; stutt sagt, kúgari og kúgaður hava støðugt staðið í andstøðu hvør móti øðrum og ført ein óbrotnan bardaga, stundum í duldum, stundum púra opið; ein bardagi, sum hvørja ferð endaði við kollveltandi umskapan av samfelagnum ella við, at stríðandi stættirnar saman eru gingnar til grundar.

Karl Marx & Friedrich Engels
*Manifest der Kommunistischen Partei*
1848

1. Hesi trý tekstbrotini umboða hvør sína politisku hugsjón. Skriva upp týdningarmikil orð úr hvørjum teksti. Hvør tekstur og hvør hugsjón hoyrir saman?

2. Ein av tekstunum er skrivaður sum reaktión upp á eina umfatandi hendingagongd, sum fór fram beint tá. Hvør er teksturin, og hvat var tað, sum hendi?


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Endin á 1800-talinum – friður, framleiðsla og vápnadubbing

1. Eyðkent fyri tíðina seinast í 1800-talinum er framtíðarvónin í stórum pørtum av Evropa og USA. Hví mundu mong vera so vónrík fram móti 1900-talinum?

2. Finn dømi um tøknilig nýbrot, sum lættu um lívið hjá fólki.

3. Ikki er langt síðani, at vit høvdu eitt aldaskifti, ið enntá eisini var eitt túsundáraskifti. Samanber hesi bæði aldaskiftini. Kenna vit somu vón og framtíðartrúgv fyrst í 21. øld, sum fólk í vesturheiminum kendu á sær fyrst í 20. øld? Skriva niður tína meting hesum viðvíkjandi!

4. Ger samrøðu við ein floksfelaga, hvat hann/hon væntar sær og vónar av 21. øld. Ganga vit móti betri ella verri tíðum? Hvat hava vit lært av 20. øld? Samanber samrøðuna við tína egnu meting hesum viðvíkjandi.



© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Steðgipláss: Foreldraloysingur í London

1. Hvussu nógv fólk búðu í London um ár 1830?

2. Mundi Charles Dickens finna íblástur úr sínum egna lívi, tá ið hann skrivaði bókina um *Oliver Twist*? Grundgev fyri svari tínum.

3. Í tekstinum stendur, at Charles Dickens lýsti „baksíðuna av liberalismuni". Hvat heldur tú, at meint verður við hesi orðing?

4. Skriva eina søgu um ein dag í lívinum hjá Oliver Twist. Brúka hugflogið og tað, tú hevur lært úr bókini!


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Steðgipláss: Umhvørvisdálking

1. Hvat er "*smog*"? Hvussu verður hann gjørdur? Veitst tú um nakað stað í Føroyum ella Norðurlondum, har líknandi trupulleikar eru í dag? (Brúka netið, um tú ikki veit svarið!)

2. Hvørjir umhvørvistrupulleikar stóðust av bretska klædnaídnaðinum?

3. Hvussu bar til, at dálkingin ótarnað helt fram, uttan at roynt var at steðga henni?

4. Ímynda tær, at tú flytur av bygd í bý um hesa tíðina. Skriva eitt bræv heim, har tú greiðir frá, hvussu lívið hjá tær er broytt.


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Hvør eri eg?

**Vel rætta svarið og set bókstavin í rútin.**

1. ☐ Tú noyðist at gera tað, tú kanst at yvirliva. Eg spinni eitt sindur við hús og selji tað so til ein handilsmann í býnum.

2. ☐ Einstaka menniskjað má hava meiri frælsi! Burtur við lagskipanini. Set í verk trúarfrælsi. Hvørjum bíða vit eftir?

3. ☐ Nú mugu vit altso sissa okkum! Kongur, aðal og kirkja skulu stýra fólkinum. Tað hava vit gjørt ómetalig leingi.

4. ☐ Hvat eg geri? Jú, við hús lyfti eg ikki hond frá síðu. Eg skal taka ímóti gestum og eiga børn. Tað hevur týdning, at makin kann vera errin av mær. Tað er umráðandi at vera fín.

5. ☐ Eg veit, hvussu búskapurin í heiminum skal síggja út. Londini skulu spesialisera seg at gera tær vørur, tey duga best at tilvirka. Harumframt krevst frí kapping.

6. ☐ Nógv verður tosað um, at alt verður betri. Men liberalisman hevur í roynd og veru eina baksíðu. Les bøkur mínar, so skilir tú tað!

7. ☐ Eg eri heimsins ríkasta og máttmiklasta kvinna. Harumframt havi eg átt níggju børn. Tað undrar ikki meg, at mong síggja meg sum eina fyrimynd!

8. ☐ Tað sigur seg sjálvt, at vit kunnu ríva niður stóran part av París. Eg vil byggja nýtt og sissa øll tey arbeiðsleysu við arbeiðsskapandi tiltøkum.

9. ☐ Skilja tit tað ikki? Arbeiðarar eru trælir hjá yvirstættini. Ein kollvelting fer at koma. Saman hava vit alt at vinna!

10. ☐ Eg standi her 12-13 tímar um dagin. Hættisligt og einsháttað er tað eisini. Í dag var tað aftur ein, sum fekk armin fastan í vevimaskinuni.

**A** Ein liberalur

**Á** Napoleon 3.

**B** Viktoria drotning

**D** Karl Marx

**Ð** Ein bóndakona

**E** Adam Smith

**F** Ein konservativur

**G** Charles Dickens

**H** Ein kona úr yvirstættini

**I** Ein verksmiðjuarbeiðari


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Minnist tú?

| | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| **1.** Hvussu eitur mótsvarið, arbeiðsgevarar hava til verkfall?<br>1) Verkfall X) Verkbann 2) Vilt fall | | | |
| **2.** Hvat framleiddu fyrstu ídnaðarfyritøkurnar?<br>1) Amboð X) Tok 2) Bummullsklæði | | | |
| **3.** Hvørjari sjúku eydnaðist tað læknanum Edward Jenner at finna koppingarevni ímóti?<br>1) Spitalskusjúku X) Koppum 2) Skyrbjóg | | | |
| **4.** Í hvørjum landi byrjaði ídnaðarkollveltingin?<br>1) Í Bretlandi X) Í Russlandi 2) Í Fraklandi | | | |
| **5.** Leiðandi hugsjónarmenn aftanfyri kommunismuni vóru Karl Marx og<br>1) Edmund Burke X) Friedrich Engels 2) Adam Smith | | | |
| **6.** Hvat ár var februarkollveltingin í París?<br>1) Í 1877 X) Í 1830 2) Í 1848 | | | |
| **7.** Hvussu langa tíð tók tað at koyra við toki millum París og Berlin?<br>1) Uml. 2 dagar X) Uml. 12 tímar 2) Uml. 16 tímar | | | |
| **8.** Hvussu høgt er Eiffeltornið?<br>1) 550 metrar X) 120 metrar 2) 300 metrar | | | |
| **9.** Hvat brúktu læknarnir fyri at doyva ein sjúkling?<br>1) Opium X) Eter 2) Alkohol | | | |
| **10.** Nær komu fyrstu filmarnir?<br>1) Í 1810 X) Í 1848 2) Í 1895 | | | |


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Svar: Hvør eri eg?

1. Ð
2. A
3. F
4. H
5. E
6. G
7. B
8. Á
9. D
10. I

# Svar: Minnist tú?

| | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. | | X | |
| 2. | | | 2 |
| 3. | | X | |
| 4. | 1 | | |
| 5. | | X | |
| 6. | | | 2 |
| 7. | 1 | | |
| 8. | | | 2 |
| 9. | | X | |
| 10. | | | 2 |


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9